# Fundarfrágreiðing til HSF-limafundi mikudagin 4. september 2024

Luttakandi: Gunn Ellefsen, Jógvan Emil Nielsen, Heini Ellingsgaard, Kristian Østergaard fyri Starvsnevndina. Ann Mari Wang fyri Menningar- og úrvalsnevndina. Thomas Juul Thomsen fyri Dómaranevndina. Andras Nolsøe fyri ÍSF. Ári Rouch, Mark Lausen-Marcher, Hallur Danielsen og Andrass Thomsen fyri umsitingina. Sunneva Vesturdal fyri EB. Bjørg Patursson fyri VÍF. Annika Arge fyri Stjørnuna. Eyðun Mortensen fyri Kyndil. Eyðun Joensen og Beinta Fossadal fyri H71. Sólja Jóanisdóttir fyri SÍF/Søljuna. Malan Justinussen og Rudi Olsen fyri ÍA. Dan Lamhauge fyri Tjaldur. Alexandur Johansen fyri StÍF. Gestir vóru Andras Nolsøe (ÍSF) og Mladen Mjerimacka (HSF). Ikki umboðaði KÍF, Team Klaksvík og Neistin.

Andrass Thomsen, stjóri, beyð vælkomin og gjøgnumgekk skránna.

**1.0 Málverjamennari settur, Mladen Mjerimacka**
HSF hevur sett Mladen Mjerimacka í starv sum málverjamennara. Mladen greiddi sjálvur frá leiklutinum, sum hevur til endamáls at lyfta økið og betra um føroysku málverjarnar. Mladen kunnaði um ætlanir, at koma út til feløgini við málverjaverkstovum.

**1.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu framløguni gætur.

**2.0 Framløgu um Eystanstevnutiltak, Dan Lamhauge**
Dan Lamhauge hevði framløgu um tiltak, sum Tjaldur skipaði fyri á Eystanstevnu, har børn vandu saman við landsliðsleikarum.

**2.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**3.0 Álmanakki og kunning**
Ári Rouch, kappingarleiðari, legði álmanakkan fyri kappingarárið 24/25 fram. Álmanakkin liggur altíð í dagførdari útgávu á heimasíðuni hsf.fo. Arbeitt verður við einari sterkari visuellari útgávu av álmanakkanum.

Hartil kunnaði Ári um tilmeldingarfreistir, undantaksloyvi og námsferðir. Søkjast kann um at flyta dystir í sambandi við námsferðir tvær ferðir um árið. Fyri kappingarbyrjan 1. september og 1. januar í kappingarárinum.

**3.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**4.0 Uppskot til samtyktar**
Ári Rouch legði fram uppskot, at U16 deildirnar eisini kunnu taka leikbrá, eitt í hvørjum hálvleiki. Hartil kunnu liðini koyra eyka útileikara inn tá liðið hevur útvísing.

**4.1 Niðurstøða**
Broytingaruppskotið var samtykt.

**5.0 Álmanakkin**
Ári Rouch, kappingarsamskipari, legði fram álmanakkan fyri kappingarárið 2024/25 fram. Álmanakkin verður lagdur á heimasíðuna í næstum og fer eisini at koma ú fyri kappingarbyrjan í einari lættari grafiskt, lesiligari i útgávu.

**5.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**6.0 Dómaranevndin**
Ári Rouch, dómarasamskipari, legði fram vegna Dómaranevndina. Støðan við dómarum er enn viðbrekin. Dómaranevndin hevur skipað fyri einum væleydnaðum dómaraskeiðið fyri viku síðani, har 16 dómarar og 4 eygleiðarar luttóku. Nýggj dómaraandlit verða at síggja í fremstu deildunum í kappingarárinum. HSF arbeiðir leypandi við at lyfta dómaraøkið. Til hetta kappingarárið verður tað krav at øll feløg skulu stilla við minst einum b-dómaraparið, hetta smb. kappingarreglunum.

Dómaranevndin fer næsta vár at koma út til feløgini við dómaraskeiðum fyri nýggjar dómarar.

**6.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**7.0 live.hsf.fo**
Hallur Danielsen kunnaði um gongdina og legði tølini fyri 2023/24 fram. Live.hsf.fo gav aftur í 2023/24 eitt lítið yvirskot. Eisini var kunnað um ætlanir at seta eina nevnd við umboðum úr feløgunum og HSF, sum skal varða av og menna live.hsf.fo. Arbeiðið við at fáa betri grafikk og tøl til dystirnar gongur væl.

**7.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**8.0 Leikaramenning 2024/25**
Mark Lausen-Marcher, ítróttastjóri, legði fram. Mark vísti á nakrar broytingar í mun til hvussu leikaramenningini verður skipað komandi kappingar, men er talan um smávegis tillagingar.

**8.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**9.0 Live.hsf.fo**
Hallur Danielsen, ábyrgdari, greiddi frá gongdini og frá ætlanunum at seta ein arbeiðsbólk, sum skal arbeiða við at betra um produktið.

**9.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**10.0 Sideline**
Mark Lausen-Marcher, ítróttastjóri, kunnaði um ymiskt í sambandi við Sideling, m.a. Handball AI og hvussu hetta riggar. Eisini var kunnað um ætlanirnar fyri komandi kappingarár.

**10.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**11.0 Føroyska venjaraútbúgvingin**
Mark Lausen-Marcher greiddi frá ætlanunum fyri komandi kappingarár. HSF verður í næstum partur av Rinck-avtaluni hjá EHF, sum merkir at talan verður um altjóða góðkenda venjaraútbúgving. Mark hevði framløgu um hetta og um hvørji skeið verða á skrá í vetur.

**11.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**12.0 Ymiskt**
Kunnað var um leikaramenngina og landsliðsvirksemi komandi vetur.

Umboð fyri Søljuna bar fram ynski at deila U16 deildina í tveir bólkar, soleiðis at liðini fáa fleiri javnbjóðis dystir. 12 lið hava meldað til D16 og 11 lið til G16 í vetur. Ári Rouch viðmerkti, at tað kemur so at siga fyri hvønn vetur at fleiri U16 lið fella frá í leypi av kappingarárinum og at tað tískil var ivingarsamt um tað var grundalag fyri at deila U16 í tveir bólkar. Helst skulu 14-15 tilmeldingar til um hetta skal verða aktuelt.

Semja var um, at hetta kundi takast upp aftur á limafundinum í januar.

**Fundarskrivari:**
Ári Rouch